

# FULLTRÚI TIL LØGMANSSKRIVSTOVUNA

## Løgmansskrivstovan leitar eftir fulltrúa. Trívist tú mitt í politiska maskinrúminum, har ferðin mangan er høg? So er hetta møguliga rætta starvið til tín.

**Stutt um starvið**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um ritarauppgávur, tvørgangandi verkætlanir og at fylgja upp politisk mál. Tú fært eitt nú ábyrgd av at:

- Fyrireika tilfar, fundir og fyrisitingarlig mál til løgmann
- Vera partur av ella leiða tvørgangandi verkætlanir
- Samskipa og fylgja upp mál hjá landsstýrinum

**Stutt um teg**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni í eitt nú stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Harumframt ímynda vit okkum, at tú:

- Hevur starvsroyndir í almennari fyrisiting
- Dugir væl at greina og hevur politiskt tev
- Ert ágrýtin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góðar munnligar og skrivligar samskiftisførleikar
- Dugir væl at samstarva og røkja sambond

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya ella avvarðandi fakfelag.
Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, hini stjórnarráðini og stovnar undir stjórnarráðunum. Tænastustaðurin er í løtuni Løgmansskrivstovan. Tann, sum verður settur, má tola broytingar í starvsuppgávum.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsrensli og øðrum skulu sendast til starv@tinganes.fo.

**Freistin at søkja starvið er 19. august 2024 kl. 12.00.**

*Vilt tú hoyra meira?*
*Hevur spurningar um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til*
*Pól R. Wolles, deildarstjóra, á telduposti: polrw@tinganes.fo ella telefon: 504705.*

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
Prime Minister's Office